# framgongd í Sørvági

## Sjóhiti til skúlan

Í samstarvi við Jarðfeingi hevur Sørvágs kommuna arbeitt við eini ætlan um at leiða sjóhita úr sandinum og nýta hann til upphiting av skúlanum.

Hetta hugskotið hevur vakt ans, og hevur Innlendismálaráðið játtað at verða við í figgingini.

Hugskotið er at leggja 5 km av jørðslangu ein metur niður í sandin, haðani ein kann upptaka ta orkuna sum skal nøkta tørvin hjá bæði skúlanum og svimjihøll hansara.

- Henda skipanin er roynd aðrastaðni, men hetta er fyrstu ferð at hon verður roynd í Føroyum, vísir borgarstjórin, Sune Jacobsen á.

Tvær føroyskar fyritøkur hava verið við í arbeiðinum, og skal fyritøkan Reno-Vent gera tær seinastu kanningarnar, áðrenn endalig støðan kann takast til ætlanina.

**Tey gomlu skulu doyggja. Tey ungu kunnu doyggja, verður sagt. Men her hjá okkum eru fleiri fólk farin í bestu árum**



ARBEIÐI

*Nógva fiskaarbeiðið í Sørvági skapar eisini inntøkur til kommununa. Skattainntøkan í 2010 vaks við nærum 1,2 mió krónum, til góðar 28 mió krónur í fjør*

## Fleiri ung doyggja

Fólkatalið í Sørvágs hevur verið støðugt tey seinnu árini. Tó sæst ein broyting, og tað er at fleiri ungfólk eru farin í farna ári.

Í kommununi sum fevnir um bygdirnar Sørvág, Bø, Gásadal og Mykines búgva í dag 1136 fólk, sum eru fýra færri enn árið fyri.

Um hugt verður eftir talinum av andlátum sæst, at tey eru vorðin fleiri. Í keldum frá 1986 sæst, at í miðal eru 10 fólk deyð um árið.

Í 2010 hendi tó tann broytingin, at 22 andlát hava verið í kommununi.

- Tey gomlu skulu doyggja. Tey ungu kunnu doyggja, verður sagt. Men her hjá okkum eru fleiri fólk farin í bestu árum.

- Tí kennist sorgin og saknurin so stórur í okkara lítla nærumhvørvi, har vit koma hvørjum øðrum meiri við, sigur Sune Jacobsen. - At veita styrki og vón, kann bert tann Eini gera.

Skuld:

## 13 mió krónur

Langfreistaða nettoskuldin hjá Sørvágs kommunu var við árslok 8,5 mió krónur. Haraftrat hevur kommunan fingið tilsøgn um at læna 5,6 mió til lutvísa figging av íløgum í ár. Soleiðis verður samlaða nettoskuldin við árslok góðar 13 mió krónur.

Men tann greiði boðskapurin hjá Suna Jacobsen er, at áhaldandi tosið um at leggja kommunur saman við lóg hevur gjørt meiri skaða enn gagn.

Hann vísir á, at nógvar kommunur vóru á sinni skuldarbundnar upp um skorsteinin í 90'unum, men seinni var skuldin komin niður á eitt meiri hóskandi støði.

Tað sum nú hendir er, at flestu kommunur byrjaðu at gera íløgur, so tað komu upp undir skuldarmarkið, eins og myndugleikarnir byrja at tosa um samstarv á skúlaøkinum.

**Um teir fyrstu 11 mánaðirnir í 2009 og 2010 verða sammettir, so var inntøkan góðar 26,8 mió krónur í 2009, meðan hon í fjør vaks við nærum 1,2 mió krónum, til góðar 28 mió krónur**

## Íløgur fyri 8,5 mió krónur

Í ár fer Sørvágs kommuna at gera íløgur fyri 8,5 mió krónur.

Av hesi upphæddini fer skúlin við einum stórum parti - 4 mió - meðan ætlanin at fáa sjóhita úr sandinum niðan til Sørvágs skúla fer at kosta 1,1 mió krónur.

Annars verða 855.000 krónur nýttar til byggibúning, 400.000 krónur til ymisk arbeiðir við dagstovnin Alvalon og 750.000 krónur til vegir og amboð, eins og 300.000 krónur fara til at seta upp eitt reinsiverk til vatnið í Gásadali.